## Skive flutti upp

Skive tryggjaði sær um vikuskiftið uppflyting til donsku 2. deild. Skive spældi ímóti Randers í Danmarksseriuni og vann 3-2. Fyrsta málið í dystinum gjørdi Christian Lundberg, sum nú fer til Klaksvíkar at spæla við KÍ restina av kappingárinum. Dysturin endaði við 3-2 sigri til Skive, og tað var nóg mikið til at tryggja teimum uppflytingina. John Petersen spældi eisini við hjá Skive. Hann byrjaði inn og spældi til ein hálvur tími var eftir at spæla.

# Høvdingar hittust

**Í vikuskiftinum varð siðvanda kviktalvskappingin Ciudad de León telvað í Spania**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Seinastu árini hava telvararnir havt møguleika at nýta talvforrit sum stuðul, men í ár eru fyrireikararnir farnir aftur til góða gamla kviktalvsstílin.

Telvararnir vórðu hesir: 1. Veselin Topalov (2804) úr Bulgaria 2. Viswanathan Anand (2803) úr India 3. Francisco Vallejo Pons (2666) úr Spania og 4. Lazaro Bruzon (2652) úr Kuba.

Mannagongdin varð sum vant tvær hálvfinalur og síðani finala.

**Anand í trupulleikum**

Í fyrru hálvfinaluni fríggjadagin mundi tað eydnast Bruzon at basa Anand. Øll fýra kviktalvini (25 min. hvør) endaðu við javnleiki. Í umtalvunum vann Bruzon fyrsta snartalvið og átti ikki at tapt tað seinna. Men Anand vísti sín mátt og vann at enda dystin við marathondystin 4,5 – 3,5.

Anand hevði annars ring úrslit at vísa á frá júst telvdu talvolympiadu. Á komandi ratinglista, sum verður kunngjørdur 1. juli, dettur Anand niður um 2800-markið.

Heimsmeistarin Veselin Topalov vann seg í finaluna eftir 2,5-1,5 sigur á Vallejo. Eftir fyrstu trý kviktalvini, var dysturin avgjørdur. Topalov var nevniliga á odda 2,5-0,5. Vallejo fekk tó pyntað á úrslitið við einum óvanliga knúsandi sigri í fjórða og einki-sigandi talvinum.

**Øgiligur kviktelvari**

Høvdingarnir í heimselituni í finaluni. Soleiðis skal tað vera. At gagnnýta sína favorittrollu styrkir nógv um mentalu styrkina hjá einum, serliga í talvítróttinum.

Topalov er í løtuni sterkasti telvari í heiminum. Men í kviktalvi verður Anand mettur at vera tann stinnasti. So at siga í hvørjari kvikkapping Anand telvar við í, vinnur hann hana.

Í fyrsta talvinum royndi Topalov at knekka Anand, men hóast meirfinnu, eydnaðist tað indaranum at halda tørn. Javnleikur. Anand vann hegnisliga næsta talvið, tá hann leikti rókaendatalvið betur enn Topalov. Heimsmeistarin megnaði ikki at fáa meir enn javnt í triðja- og í fjórða talvinum, og tískil endaði dysturin við 2,5-1,5 sigri til Anand.

## Talvið hesa vikuna

**Anand,V (2803) - Topalov,V (2804)**
XIX Ciudad Leon (kviktalv) 11.06.2006

**1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 Rif6 4.0–0 Rixe4 5.d4 Rid6** (Topalov telvar til tíðir Berlin-frábrigdið í sponskum. Men tapið fyri stuttum ímóti Svidler og nú ímóti Anand eiga kanska at fáa Topalov at velja aðrar byrjanir?! Men ein heimsmeistari veit helst betur enn ein træflytari úr Føroyum…) **6.Bxc6 dxc6 7.dxe5 Rif5 8.Fxd8+ Kxd8** (Svartur satsar uppá bispaparið og betri endatalv, men hevur m.a. mist borgina aftur fyri) **9.Ric3 Ke8 10.h3 Rie7 11.Re1 Rig6 12.Bd2 Be7 13.Rad1 Rif8 14.Rid4 Bc5 15.Rib3 Bb6 16.Be3 h5 17.Rd2 Rie6 18.Rie4 Bxe3 19.Rxe3 b6 20.Rid4 Rixd4 21.Rxd4 c5 22.Rd2 Bf5 23.Rig5 Ke7 24.Rf3!** (Anand fer út í rókaendatalv, har hann hevur hampiliga greiðan fyrimun) **24...Be6 25.Rixe6 Kxe6 26.Rfd3**

Støðumynd eftir 26.Rfd3



**26…Kxe5** (Kongur mitt á borðinum - bakkar ikki ein tumma) **27.Re3+ Kf6** (Djarvi kongurin heldur tó kortini at bakka man vera best í hesum føri) **28.Rd7 Rhf8** (Rhd8 hevði verið væl betur. Tó skal havast í huga, at talan er um kviktalv, har tíðin spælur størri leiklut enn vanligt) **29.Rxc7 g5 30.Kf1 h4 31.a4 Kg6 32.Ree7 Rad8 33.Ke2 a5 34.Rc6+ f6 35.Rxb6 Rd4 36.b3 c4** (Topalov sprellar ófført, men Anand letur ikki slíkan fyrimun fara) **37.Ree6 cxb3 38.cxb3 Kf5 39.Re3 Rc8 40.Rf3+ Ke4 41.Re6+ Kd5 42.Rfxf6 Rc2+ 43.Kf1 Rd1+ 44.Re1 Rdd2 45.Kg1 Rb2 46.Rf5+ Kd4 47.Rxg5 Rxf2 48.Rg4+ Kd3 49.Re5 Rfc2 50.Rxa5 1–0**





**Skjótt og bíligt av landinum - tá tað passar tær**

| | | Prísir úr: |
|---|---|---|
| Keypmannahavn | Upp í 27 ferðir um vikuna | 2020 |
| Billund | Upp í 7 ferðir um vikuna | 2046 |
| Aalborg | Upp í 2 ferðir um vikuna | 2068 |
| Rekjavík | Upp í 5 ferðir um vikuna | 1747 |
| London | 2 ferðir um vikuna | 2072 |
| Aberdeen | 2 ferðir um vikuna | 1938 |
| Hetland | 2 ferðir um vikuna | 2037 |
| Oslo | 2 ferðir um vikuna | 2033 |
| Stavanger | Upp í 2 ferðir um vikuna | 1832 |
| Stord | 1 ferð um vikuna | 1832 |
| Narsarsuaq | 2 ferðir um vikuna | 5874 |

**... og tá eru skatturin og onnur avgjøld íroknað.**

Prísirnir eru við keypi á atlantic.fo
Les meira á heimasíðuni.

www.sansir.fo

Bílegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo

ALPHA Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 312 600 | Flogfelag Føroya Tel 340 000 | Fonn Flog Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo